## Funnu fyrstu múrarnar

Ísraelskir fornfrøðingar hava funnið leivdirnar av einum átta metrar høgum múri beint uttan fyri tann gamloa býarpartin í Jerusalem. Múrurin, sum er í einum palestinskum býlingi, er sambært fornfrøðingunum umleið 3.700 ára gamal og sostatt helst ein partur av tí fyrsta múrinum við Jerusalem. Sambært fornfrøðingunum er múrurin frá tíðini, áðrenn ísraelittar ella jødar sambært Bibliuni tóku tað heilaga landið. Teir halda, at múrurin hevur bundið býin saman við ta einastu kelduna, sum var har um vegir.



## Útlendskir fiskimenn

Umborð á norska línubátinum Ny-Ango, sum er skrásettur á Godøya, er minnilutin av manningini norðmenn, meðan meirilutin eru pólllendingar. Ny-Ango er ikki nakað eindømi í norska fiskiflotanum, tí alt fleiri reiðarí hava trupulleikar við at fáa norðmenn at støðast umborð á skipunum, sigur NRK. Harafturat er tað ein trupulleiki fyri fiskiflotan, at nógvir fiskimenn velja at fara í frálandavinnuna. Í norska sjómannafelagnum hava tey illgruna um, at fleiri reiðarí manna skipini við útlendingum, tí teir eru bíligari fyri reiðaríið enn norskir fiskimenn.

# Gera aftur eina roynd at lata Kósavirkið upp

**Nógv fundarvirksemið er í Klaksvík í løtuni í eini roynd at lata stóra flakavirkið á Kósini upp aftur, men stigtakarin er svartskygdur**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður aftur ein ítøkilig roynd gjørd at lata stóra flakavirkið í Klaksvík, Kósavirkið, upp aftur.

Í hesum sambandi er nógv fundarvirksemi í Klaksvík í løtuni fyri at lodda dýpi og fyri at fáa greiði á, hvat ber til og ikki.

Nú ein dagin vóru bæði arbeiðarafeløgini í Klaksvík, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, á fundi við Johan Páll Joensen, vinnulívsmann, sum hevði Kósina, tá ið hon læt aftur.

Á tí fundinum varð tosað aftur og fram um, hvørjir møguleikar eru at fáa virkið upp aftur.

Ein spurningur, sum varð reistur á fundinum var, um arbeiðarafeløgini eru sinnað at seta pening í eitt felag, sum skal endurreisa Kósavirkið.

Nú skulu so arbeiðarafeløgini hava fundir sína millum fyri at taka støðu til spurningin.

Og seinni verður so aftur fundur við Johan Páll Joensen um støðuna.

### Svartstygdur

Sjálvur sigur Johan Páll Joensen, at fundirnir við arbeiðarafeløgini snúði seg bara um at hava ein følara úti.

Sjálvur hevur hann ikki hug at gera nakað serligt burtur úr støðuni.

- Tað einasta, sum er hent, er, at vit hava havt ein lítlan kunnandi fund við arbeiðarafeløgini.

- Talan var bara um eitt prát fyri at vita um áhugi er fyri at fáa Kósina upp aftur, men enn er onki kjøt á nøkrum og ongin ætlan at tosa um, sigur Johan Páll Joensen.



*Í eitt ár hevur Kósin ligið sum eitt spøkilsi niðri á bryggjuni í Klaksvík, men nú verður enn ein roynd gjørd at blása lív í hetta stóra arbeiðsplássið, sum breyðføddi fleiri hundrað fólkum*

Hann sigur, at hetta er bara ein roynd at lodda dýpið einaferð afturat og tí høvdu tey ein fund við tey bæði arbeiðarafeløgini.

Men hann staðfestir samstundis, at hann er svartskygdur um royndina at fáa Kósina up aftur.

- Eg eri alt annað enn bjartskygdur, tí vit hava arbeitt við hesum í skjótt eitt ár og tað hevur ikki gingið nakran veg enn.

Hann sigur, at ein orsøk til, at tað gongur so illa, er, at tað er vónleyst at fáa fígging.

# Umhugsa at hjálpa til at lata Kósavirkið upp

**Bæði arbeiðarfeløgini í Klaksvík umhugsa nú um tey skulu seta pening í eitt felag, sum skal virka fyri at lata Kósina upp aftur**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Bæði Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag fara nú at taka støðu til um tey skulu seta pening í eitt felag, sum skal hava til endamáls at endurreisa stóra flakavirkið í býnum, Kósina.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, verður nú aftur ein roynd gjørd at lata Kósavirkið upp aftur.

Í hesum sambandi hevur Johan Páll Joensen loddað dýpið hjá arbeiðarafeløgunum fyri at vita um tey eru sinnað at seta pening í Kósina fyri at fáa arbeiðið aftur á virkinum.

Og tað fara arbeiðarafeløgini at taka støðu til hesar næstu dagarnar.

### Hava møguleikan

Arthur Guðjonsson, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, sigur, at fyrst í nítiárunum setti felagið pening í Kósina fyri at tryggja arbeiðsplássini.

Og skuldi tað verið, hevur felagið møguleika at seta pening í Kósina einaferð afturat.

Men um tað skal gerast, er ein spurningur, sum felagið nú skal taka støðu til og fundur verður um tað ein av døgunum.

Síðani verður fundur aftur við Johan Páll Joensen.

Formaðurin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag ásannar, at tað skal eitt ódnartak til fyri at fáa fáa Kósina upp aftur, men hann sigur, at hann er bjartskygdur

Akkurát hvat hann hevur hetta bjartskygni í, vil hann ikki siga beint nú.

Men hann sigur, at tað hevur stóran týdning fyri Klaksvík og arbeiðsfólkið í býnum, at Kósin er opin.

Einir 40 limir í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag arbeiddu á Kósini, men virkið kastar so nógv annað virksemi av sær, at tað hevur sera stóran týdning fyri allan býin.

### Ikki tað stóra

Jastrid Niclasen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at eisini tey fara at hava fund fyri at vita um tað er møguleiki hjá felagnum at seta pening í eitt felag at endurreisa Kósina.

Hon sigur, at Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag setti pening í Kósina fyrst í nítiárunum.

Men hon staðfestir, at skal talan verða um at seta pening í Kósina einferð afturat, verður tað ikki tað stóra, tí felagið hevur ikki so nógv at taka av.

Felagið hevði næstan 100 limir til arbeiðis á Kósini og nógvir av teimum hava gingið arbeiðsleysir í næstan eitt ár nú og at styrkir heldur ikki um fíggjarligu støðuna hjá felagnum.

Eisini Jastrid Niclasen hevur góðar vónir um, at Kósin letur upp aftur, men hon vil ikki siga, hvat tað er sum ger, at hon hevur so góðar vónir.